gult cyan magenta svart



## Hósdagur 8. mars

**SVF**

18.30 Jumanji 6
19.00 Collosseum
19.10 Mánadagur undir Krákugjógv (e)
20.00 Dagur og Vika við Grannum okkara
20.50 Ræittar kvinnur 4:4 – ensk røð
21.40 Starvsmæmingurin – nei-sigarin hjá ES-politikkaranum
22.10 Krimitímin: Dalziel og Pascoe 1:2 – ensk krimirøð
23.00 DR-dokumentar: Søgur av einari politistøð
00.00 Liðugt

**EURO SPORT**

07:30 Ski Jumping
08:00 Snowboard
08:30 Live Alpine Skiing
10:00 Golf
11:00 Car Racing
11:30 Live Alpine Skiing
13:00 Cross-Country Skiing
14:00 Ski Jumping
15:00 Alpine Skiing
15:45 Alpine Skiing
16:45 News
17:00 All Sports
17:30 Xtreme Sports
18:00 Athletics
18:30 Judo
19:30 Boxing
21:30 Rally
22:00 News
22:15 Football
00:15 News
00:30 Close

**BBC PRIME**

00.00 TLZ: »American Visions – The Wave from the Atlantic«
01.00 TLZ: »Horizon – The Time Lords«
02.00 TLZ: »What Have the '70s Ever Done For Us?«
02.10 TLZ: »Background Brief: Our Biggest Smallest«
02.30 TLZ: »Maiden Flights«
03.00 TLZ: »The Next Big Thing: Eyes in the skies«
03.30 TLZ: »The Science of Climate?«
04.00 TLZ: »The French Experience – Culture«
04.15 TLZ: »The French Experience – Les Couleurs de la France«
04.30 TLZ: »Landmarks – Explorers and Encounters – Columbus – Across the Ocean«
04.50 TLZ: »Make or Break – Great Expectations«
05.30 TLZ: »Starting Business English«
06.00 Joshua Jones: »Spook«
06.10 Monty the Dog: »Monty at the Library«
06.15 Playdays: »Tent Stop«
06.35 Insides out
07.00 The really Wild Show: »South Africa«
07.30 Ready Steady Cook
08.00 Style Challenge: »Gothic Sisters«
08.25 Change that: »Ragley Hall«
08.50 Going for a Song
09.30 Top of the Pops Plus
10.00 Antiques Roadshow: »Cliveden«
10.30 TLZ: »Earth Story – Journey to the centre of the earth«
11.30 Country Tracks
12.00 Ready Steady Cook
12.30 Style Challenge: »Bingo«
13.00 Doctors: »Twist Of Fate«
13.30 EastEnders
14.00 Change that: »Bath«
14.25 Going for a Song
15.00 Joshua Jones: »Spook«
15.10 Monty the Dog: »Monty at the Supermarket«
15.15 Playdays: »Tent Stop«
15.35 Insides out
16.00 The really Wild Show: »South Africa«
16.30 TOTP Eurochart
17.00 Changing Rooms: »Hitchin«
17.30 Doctors: »A Helping Hand«
18.00 EastEnders
18.30 Animal Hospital
19.00 Yes Minister: »The Quality of Life«
19.30 The Blackadder: »The Foretelling«
20.05 Casualty: »Merry Christmas Dr Spiller«
21.05 Absolutely Fabulous: »New best Friend«
21.35 TOTP Eurochart
22.05 The Echo
23.30 Doctor Who: »Arc of Infinity«

**BBC WORLD**

00.00 BBC News
00.30 World Business Report
00.45 Asia Today
01.00 BBC News
01.30 HARDtalk
02.00 BBC News
02.30 Holiday Special
03.00 BBC News
03.30 Reporters
04.00 BBC News
04.30 Asia Today
04.45 World Business Report
05.00 BBC News
05.30 HARDtalk
06.00 BBC News
06.30 Waterworld
07.00 BBC News
07.30 Reporters
08.00 BBC News
08.30 HARDtalk
09.00 BBC News
09.30 Simpsons World
10.00 BBC News
10.30 HARDtalk
11.00 BBC News
11.30 Holiday Special
12.00 BBC News
12.30 Simpsons World
13.00 BBC News
13.30 HARDtalk
14.00 BBC News
14.15 World Business Report
14.30 Waterworld
15.00 BBC News
15.30 Simpsons World
16.00 BBC News
16.30 Asia Today
17.00 BBC News
17.30 HARDtalk
18.00 BBC News
18.15 World Business Report
18.30 Talking Movies
19.00 BBC News
19.30 World Business Report
19.45 World Sport
20.00 BBC News
20.30 HARDtalk
21.00 BBC News
21.30 Click Online
22.00 BBC News
22.30 World Business Report
23.00 BBC News
23.30 Privacy : The Net Effect

**3 VIASAT**

05:00 Børne-hjørnet med Disney
07:05 TV-shop
08:35 Garfield og venner
09:00 Alias Smith & Jones
10:00 Træneren
10:30 Horton-sagaen
11:20 Horton-sagaen
12:10 Melrose Place - classic
13:05 Vild med dig
13:30 Panter-tanter
14:00 Mig og fremtiden
14:55 Baywatch
15:45 Min kære familie
16:10 Ricki Lake
17:10 Dagens Nyheder på TV3
17:30 Med på moden
18:00 Alle tiders barnepige
18:30 Baren
19:00 GRISK - når det gælder
20:00 TV Razzia
20:30 Youngblood
22:35 Baren (G)
23:05 Dagens Nyheder på TV3
23:15 Vore værste år
00:45 Strømer i L.A.
00:15 I lyst og nød
00:45 Kojak
01:45 Drøm videre
02:15 Simpsons
02:45 Ellen
03:10 Ricki Lake (G)
04:10 Godnat

**ÚTVARP FØROYA**

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur
Sigurlaug Joensen á Skála lesur
07.15 Barnaløtan
Katrin Nolsøe Joensen og Kári Sólstein stíla fyri
07.30 Tíðindi
07.35 Morguntónleikur
08.00 Tíðindi
08.03 Morgunrásin
09.00 Tíðindi
09.03 Morgunrásin
09.50 Morgunlestur (e)
Sigurlaug Joensen á Skála lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fyrrapartsløg
Kim Hansen stílar fyri
11.00 Tíðindi
11.03 Hjá dvørgum í Níðafjøllum (e)
Hans Tórgarð lesur 11. part av framhaldssøgu eftir Annfinn í Skála
11.30 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Heimurin í dag (e)
Gunnar Skúvadal leggur til rættis
13.30 Tónleikur
14.00 Fimmarin (e)
Sigmar Bláberg leggur til rættis.
15.00 Tíðindi
15.03 Frívaktin
Sending við tónleiki og práti um sjómanslív.
Elis Poulsen skipar fyri
16.00 Tíðindi
16.03 Vangamynd
17.00 Tíðindini
17.05 Í Vingarðinum
Victor Carlsen leggur til rættis
18.05 Barnaløtan (e)
Katrin Nolsøe Joensen og Kári Sólstein stíla fyri
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Tilvera: Vit hava øll ábyrgd. - Armgarð Arge leggur til rættis
19.30 Harmonikutónar
Flóvin Jacobsen skipar fyri
20.30 Á sanganna veingjum
Gunnvør Poulsen stílar fyri
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur
Ginna Midjord skipar fyri
22.00 Rák
Anita Ottosen stílar fyri
23.00 Tíðindi

**Rás 2 FM 102 FM 107**

10:45 Orðið
Bíbliulestur v/ Anju Hansen
11:00 Birgir Beinleiðis
Birgir Sondum við gesti
12:00 Tíðindi & Lýsingar
13:00 Leysaløtan
Innsløg, prát og tónleikur
14:00 Ynskiløtan
Heilsur frá lurtarunum
15:00 Tíðindi og lýsingar
15:15 Ynskiløtan (framhald)
16:00 Laila Beinleiðis
Country, Laila Jacobsen leggur til rættis
17:00 Norðlýsið!
Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík. John William og Oliver Joensen leggja til rættis.
18:00 Tíðindi og lýsingar
18:15 Léttur tónleikur
19:00 Orð á leiðini EVR-sending
"Bíblian – er hon álítandi?"
Jógvan Zachariassen leggur til rættis
19:40 Tónleikur
21:00 Tíðindi og lýsingar
21:15 Orðið (e)
Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21:30 Girlzone
Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri. Telefon: 35 99 93 Fax: 35 99 90 E-mail: girlzone@ras2.fo

**Lindin**

13.00 Byrjan – Dagsskrá
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 Sjómanssendingin
Vitin, vertur er M.C. Restorff (e)
14.30 Tónleikur fyri børn
15.00 Tónleikur
17.00 Ungdómssendingin
Get Ready v/ Rigmor og Rebekku
18.00 Dagsins Orð
18.05 The Finishing Touch, ensk sending við tónleiki og práti. Vertur er Alex O'Campo
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending.
19.05 "The Finishing Touch" heldur fram
20.00 Tónleikur fyri børn
20.30 Okkara dagliga breyð
20.40 Møti kunngeðir fyri komandi vikuskifti.
21.00 Bønarlinjan við gesti. Bønarevnu kunnu ringjast inn frá 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379. Vertur: Jenis av Rana
Vit gevast uml. middnátt

## Mánadagur undir Krákugjógv

*– um djóralæknatænastuna (e)*

**SVF Hóskvøldið kl. 19.10**

Sjónvarpið var á vitjan á Djóralæknatænastuni ein tilvildarligan mánadag - og har høvdu tey úr at gera. Viðtala er fyrrapart uppi undir Krákugjógv, og tá eru tað fragddýrini, sum oftast hundar og kettur, sum verða kannaði og viðgjørd av teimum trimum djóralæknunum. Tey hava merkt ein støðugan vøkstur í viðtalum, nú fleiri og fleiri fragddýr verða innflutt.
Tíkin Tootsie er komin longu leiðina úr Miðvági, tí ein tonn hevur tikið ilt fyri seg, onkur hundur skal geldast og ketturnar í Havn hava ikki altíð nakran góðan. Nyttudýrini, seyður og neyt, eru eisini ein stórur partur av arbeiðnum, og henda dagin varð eisini vitjað í fjósinum í Norðradali.

## Tilvera: Vit hava øll ábyrgd

**Hóskvøldið kl. 19.00**

Sendingin hesaferð snýr seg um vistfrøði, og gestur í útvarpsstovuni er vestmenningurin Finnbogi Joensen, sum hevur stóran áhuga fyri vistfrøðini og náttúruni. Hann heldur, at vit hava felags ábyrgd av klótuni, og at hon verður latin komandi ættarliðum.

## GRISK – når det gælder




Thomas Mygind er nú í heilt øðrvísi klæðum, tá TV3 fer undir eina nýggja sendirøð, har luttakarar í spurnarkappingum kappast um 2 mió.kr. Spurningurin er sjálvsagt, hvussu nógv luttakararnir eru til reiðar at ofra, til tess at røkka teimum báðum milliónunum, tí um onkur vinnur, merkir hetta sjálvsagt, at onnur verða við sviið soð.

## TV Razzia




Hesa ferð fer Camilla Miehe-Renard eftir sonevndu vanabrotsmonnunum, sum allir hava eitt langt lív í kriminaliteti aftan fyri seg. Eitt lív, sum hevur kostað teimum nógvar fongsulsrevsingar, men sum ikki minst hevur volt offrum teirra stórar trupulleikar.

# ítróttur

Nr. 43 • fríggjadagur • 2. mars 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

VÍF–Kyndil 34–30 (15–17)

## Rápa bjargaði vestmenningum



*Fyri fyrstu ferð í meira enn eitt ár var DanielRápa á besta VÍF-liðnum og hansara leiklutur lá ikki eftir*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**VÍF og Kyndil spældu ein av mest undirhaldandi hondbóltsdystunum, sum hava verið leiktir í ár. Tá alt kom til alt drógu vestmenningar longra stráðið, og størsta einstaka orsøkin til hetta, var afturvendi Daniel Rápa**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hóast suverenu oddastøðuna hjá liðnum, so mundu tey í Vestmanna ikki kenna seg heilt trygg, tá manslið teirra skuldi takast við Kyndil mikukvøldið. Kyndil er – hóast misjøvnu úrslitini seinastu tíðina – altíð eitt torført mótstøðulið hjá VÍF.

Aftur at hesum kom so tað, at spælið hjá VÍF so langt frá hevur verið serliga sannførandi, síðani vónbrotið í steypafinaluni, meðan Kyndi hinvegin tykist vera ávegis upp úr aldudalinum, sum teir hava verið í síðani vetrarsteðgin.

### Sámal tók takið

Undan hesum dystinum høvdu áskoðararnir annars verið vitni til eina styrkisuppvísing frá VÍF kvinnunum, men tað var rættiliga skjótt greitt, at eingin endurtøka stóð á skránni, nú menninir skuldu dystast.

Kyndil legði seg frá fyrsta bríksli eftir at minimera leiklutin hjá Inga Olsen, við at tveita Bjarna Wardum heilt út ímóti honum, og hóast VÍF altíð munnu vera fyrireikaðir upp á hetta, so var sjónligt, at hetta órógvaði spæl teirra. Uttan Inga at fordeila spælið, gerst álopsspæl teirra sera einstáttað, har tað mest sum bert eru skjúttarnir, sum hótta mótstøðuliðið. Størsta hóttanin av hesum hevur í ár verið Áki Olsen, men at byrja við hevði kyndilsverjan sera væl fatur á honum. Breiddin í bakspælarum er tó stór hjá VÍF, og tí varð tað nú ístaðin Sámal Joensen, sum tók yvir fyrstu løtuna. Kyndilsverjan rakk snøgt sagt ikki upp á blokka skotroyndum hansara, sum úr hálva triðja metra hædd fóru buldrandi í meskarnar.

Í hinum endanum á vøllinum sýndi Kyndil í longum løtum hendan fyrra hálva tíman, at tað ikki bert var vegna lítla mótstøðu, at teir høvdu glið á álopsspælinum móti Tjaldri. Megin partin av tíðina varð roynt at leggja trýst á VÍF verjuna. Flytingarnar vóru nógvar, og tá Jónleif so eisini tóktist hava ein av sínum heilt góðu døgum, fekk Janus Einar Sørensen hópin av fríspælingum inn á strikuna, sum mest sum allar vórðu umsettar til mál.

Stóran part av fyrra hálvleiki vóru tað tó vestmenningar, sum høvdu munin á máltalvuni, men áskoðararnir fóru at sansa einum óvæntaðum úrsliti, tá Kyndil seinastu løtuna av hálvleikinum rættiliga setti ferð á.

### Rápa var trumfurin

Tá seinni hálvleikur byrjaði, tóktist VÍF fullkomuliga umskapa. Fólkið á vøllinum var tó framvegis tað sama, men ferðin var ein heilt onnur. Verjuspælið tóktist meira ágangandi, og rættiligt lív kom í áskoðarafjøldina, tá teir byrjaðu hálvleikin við at smekka tveir bóltar inn.

Kyndil megnaði tó at vinna leiðsluna aftur, hevði tað ikki verið fyri seinasta trumfinum hjá Hjalmari Klein Olsen, so er heldur ikki nógv at ivast í, at úrslitið hjá gestnum kundi verið væl betri, enn tað sum alt endaði við.

Eftir drúgvan skaðasteðg, hevur rumenski Daniel Rápa aftur verið førur fyri at spæla hondbólt seinastu vikurnar. Nakrar dystir hevur hann trykkroynt seg sjálvan á næst besta liðnum hjá VÍF, og mikukvøldið var hann so fyri fyrstu ferð í eitt ár at síggja á besta liðnum.

Hóast hann ikki hevur møguleika fyri at vera í fullari dystarvenjing enn, so var púra greitt, tat VÍF fekk yvirtakið á dystinum frá teirri løtu, at rumenin varð sendur á vøllin.

Hann varð bert nýttur í álopsspælinum – helst bangin um knæið - men evni hansara í hesum partinum av vøllinum viðførdu alt fyri eitt, at Kyndil nú fekk meira at hugsa um. Ikki minst tann sannroynd, at hann skoraði tey bæði fyrstu álopini, sum hann var á vøllinum, var viðvirkandi til hetta.

Avleiðingin av øktu ansingini við Rápa, var so sjálvandi, at eitt nú Ingi Olsen fekk betri sømdir at spæla, og áðrenn Kyndil hevði umstillað seg heilt til broyttu dystargongdina, hevði VÍF vunnið sær eina leiðslu upp á trý mál.

### Spenningurin náddi klimaks

Eftir eitt har tiltrongt Time-Out eydnaðist tó Kyndli at koma aftur í dystin, og spenningur nærkaðist einum klimaks, tá brotskast varð dømt við støðuni 30-29 til heimaliðið. Bjarni Wardum, sum undanfarnu seks brotskøstini hevði bankað bóltin upp móti høgru samankomin, skeyt lágt hesaferð, men úrslitið varð hitt sama, og so var aftur javnt.

Tað eydnaðist tó VÍF at fáa tvey skjót mál á rað eftir heta, og ikki minst mundu kyndilsmenn iðra seg um tað seinna av hesum. Hetta komst av eini dekan av djarvari roynd frá Bjarna, og í roynd og veru avgjørdi hetta helst eisini dystin.

At VÍF fekk tvey mál afturat, komst fyri sovítt bert av, at Kyndilsmenn í royndini at koppa øllum í seinastu 40 sekundunum skrúvaðu ferðina langt upp um bóltførleikan, og so kundi heimaliðið tvær ferðir revsa bólttapini.

Eftir dystin kundi so bara staðfestast, at VÍF hevði tað hepnið, sum eitt oddalið eigur at hava, tá alt ikki vil ganga eftir vild. Tað hoyrir tó við til hetta, at tað eisini vóru nakrir sera avgerandi faktorar, sum vóru í parti viðVÍF, og týdningarmestir av hesum vóru uttan iva Daniel Rápa og so málmansspælið hjá Bárði Nielsen, sum júst í røttu løtuni megnaði at lyfta egna spæl sítt.

Fyri Kyndil er ikki annað at gera enn at staðfesta, at Føroyameistarar verða teir so undir ongum umstøðum hetta kappingarárið. Hinvegin kann avrikið verða enn ein steinur upp á sálarliga varðan, sum skal byggjast við atliti til komandi kappingarár. Teir megnaðu enn einaferð at spæla fuilt upp móti fremsta liðnum í landinum, og næsta stig á leiðini verður helst at finna út av, hvussu teir eisini kunnu hetta móti teimum næst- og triðbestu mótstøðuliðnum. Tað eru nevnliga fyrst og fremst dystirnir móti hesum, sum hava viðført, at Kyndil ikki hevur fleiri stig enn teir hava í løtuni.



*Tað gekk stundum hart fyri seg, uttan at spælið tó á nakran hátt gjørdist óreint*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Dysturin í tølum

**Málskjútar:**
VÍF: Sámal Joensen 12(1), Áki Olæsen 8, Ingi Olsen 7(3), Daniel Rápa 3, Martin Hummeland 3, John Zachariassen 1
Kyndil: Bjarni Wardum 10(7), Janus Einar Sørensen 7, Hans Áki Dal Christiansen 5, Jónleif Sólsker 3, Uni Wardúm 3, Heini Bendsten 1
Brostkøst: VÍF 4, Kyndil 7
Útvísingar: VÍF 3, Kyndil 6
Diskvalifikatiónir: Kyndil 1 (3X2 minuttir)
Dómarar úr StÍF: Jústines Justinussen og Pole Hansen. Eiga uppiborið rós, tí teir alla tíðina megnaðu at halda hóndbóltsspælinum í hæddini og sinnalagið á leikarunum niðri á jørðini.

gult cyan magenta svart